Tjóðskjalasavnið

# Vegleiðing um góðskutrygging í kt-skipanum

- Minstukrøv og tilmæli
  Tjóðskjalasavnið, 2016

## Innleiðing

Orðið “góðska” verður brúkt í ymiskum høpi og kann hava ymiskan týdning. Í hesum høpi snýr góðska seg um, at tað er møguligt at finna dátur og skjøl aftur í kt-skipanum hjá kommunalum- og landsstovnum.

Góðskueftirlit skal tryggja, at skrásetingar í skipanum eru rættar, og at tað er møguligt at leita fram tær røttu upplýsingarnar. Tað kann til dømis vera eitt gott hugskot at eftirkanna um t-postsamskifti hava sigandi heiti fyri innihaldið, ella um tey eru skrásett við tí sjálvirkandi “SV:SV:SV: spurningur um x-mál”. Ella eftirlit við, at tað verða goymdar einans loyvdar fílur, soleiðis at skjølini kunnu opnast og lesast.

## Góðskueftirlit sbrt. fráboðanar- og góðkenningarrundskrivinum hjá Tjóðskjalasavninum

Stovnar skulu javnan eftirmeta góðskuna av teirra kt-skipanum við skjølum. Tað skal vera lýst í leiðbeiningini í skipaninin, hvussu myndugleikin skal gera kanningina. Góðskueftirmetingin er ein fortreyt fyri, at Tjóðskjalasavnið kann góðkenna skipanina sambært “Rundskriv um fráboðan og góðkenning av kt-skipanum nr. xxxx av xx.xx.201x”.

2 ár eftir at góðkenningin er framd, ger Tjóðskjalasavnið eitt eftirlit og kannar, um skipanin verður brúkt sum lýst í leiðbeiningini, herundir um myndugleikin hevur gjørt sjálvseftirlit. Góðkent eftirlit er ein treyt fyri avhending av eini kt-skipan eftir frymli B (løtumynd) og frymli C (lokin mál). Skipanir, sum ikki kunnu góðkennast, skulu avhenda eftir frymli A (tíðarskeið). Eftirlitið merkir, at gjørligt verður at gera nakað við møguligar trupulleikar, meðan skipanin er virkin, og ikki tá ið skipanin skal avhendast. Hetta skuldi givið betri virkandi skipanir hjá stovnunum, soleiðis at tað eisini verður lættari og bíligari at avhenda skjalasavnsútgávur til Tjóðskjalasavnið.

## Málbólkur

Hvussu verður ein mannagongd fyri góðskutrygging gjørd, og hvørji krøv stillar Tjóðskjalasavnið? Vegleiðingin um góðskutrygging gevur svar upp á spurningar og vendir sær til tey, sum arbeiða við góðskutrygging í kt-skipanum, antin í sambandi við fráboðan av eini skipan, ella tá Tjóðskjalasavnið fremur eftirlit við góðskutrygging.

## Mannagongd fyri góðskueftirliti

Ein góð mannagongd fyri góðskueftirlit er ítøkilig og skillig og vísir nágreiniliga á, hvør ger hvat og nær. Hvussu ítøkiligt og umfatandi eftirlitið skal verða, má leggjast eftir einum skilagóðum støði, alt eftir hvussu stórur myndugleikin er, og hvørji mál hettar snýr seg um. Góð góðska snýr seg ikki um fullkomileika, men um at nakað virkar eftir ætlan.

Góðskueftirlit eina ferð um árið er møguliga ikki nokk fyri sjálvt teir minstu myndugleikarnar, ímeðan dagligt eftirlit av øllum skrásetingum er óneyðugt dupultarbeiði. Hvør myndugleiki skal gera sær greitt, hvønn tørv ein setur fyri at rætta upp á møguligar feilir og manglar, hvat ið er endamálið við góðskueftirlitinum, umframt at myndugleikin skal seta neyðugt tilfeingi av til uppgávuna.

Tjóðskjalasavnið setur sum fortreyt, at mannagongdin skal innihalda eina frágreiðing um:

- **Hvat** skal kannast?
- **Hvør** kannar?
- **Hvussu** ofta skal góðskutrygging fremjast?
- **Hvussu** skal góðskutryggingin gerast?
- **Hvør** rættar feilir?
- **Hvussu** verður kanningin fylgd upp?

Til dømis er ikki nokk, at tað stendur "málini kannast regluliga". Tað skal ásetast neyvt:

- **Hvørji mál, sum verða vald út til eftirlit**: Allir nýupprættaðir, valdir málbólkar ella?
- **Hvat verður kannað?** Hvørjar metadátur eru um málini, hvørjar eru metadáturnar um skjølini í málinum?
- **Hvussu ofta verður eftirkannað?** Eina ferð um mánaðin, ein ferð hvønn ársfjórðing ella?
- **Hvør ger eftirlitið?** Serbrúkarin, "journalin" ella?

Í nøkrum skipanum er góðskueftirlitið partvíst sjálvvirkandi, t.v.s. at skipanin sjálv ger eina eftirkanning av til dømis skjølum uttan skjalatilknýti. Í hesum førum skal standa í mannagongdini, hvørjir partar av eftirlitinum henda sjálvvirkandi í skipanini, og hvørjir partar henda við at gera stakroyndir og/ella við úrtøku úr skipanini.

## Hvat skal kannast – minstu krøv hjá Tjóðskjalasavninum

Myndugleikar skulu hava eina arbeiðsgongd, sum tryggjar, at allar týðandi upplýsingar og skjøl verða goymd í skipanini. Haraftrat skulu myndugleikarnir kanna fleiri upplýsingar, sum standa í rundskrivinum um fráboðan um góðkenning av kt-skipanum:

| | |
|---|---|
| Mál (§ 23) | 1) Málseyðmerking<br>2) Málsheiti<br>3) Evni frá skipanarliga bygdari skrá |
| Skjøl (§ 24) | 1) Skjalanavn<br>2) Skjaladagfesting<br>3) Avsendari/móttakari (fyri inngangandi/útgangandi)<br>4) Goymsluháttur<br>5) Tilknýti til mál |
| Fíluformatir (§ 28) | • Verða aðrar fílur goymdir enn tær, ið loyvdar eru?<br>• Skjalfesting av, at eftirlit verða gjørd |
| Leiðreglur (§ 28) | • Verða leiðreglurnar dagførdar? |

Tjóðskjalasavnið

## Tilmæli hjá Tjóðskjalsavninum um góðskueftirlit

| Spurningar | Tilmæli |
|---|---|
| Hvat skal kannast? | • Minstukrøvini frá Tjóðskjalasavninum<br>• Hava tit brúk fyri fleiri upplýsingum, til dømis um skjalabólkar?<br>• Hvussu verður tryggjað, at alt av týdningi verður skjalført í málinum? Verður til dømis reglulig kanning gjørd á felagsdrevinum fyri at meta um, um øll týdningarmikil skjøl verða skrásett í málinum og um tilfar er har, ið ikki er skjalført, men sum átti at verið tað? |
| Hvør ger hvat? | • Tað kann vera ein fyrimunur við einum "dátueftirlitsbólki", har vitan og royndir kunnu samlast – og til at gera dagføringar av leiðreglum.<br>• Helst í samráð við royndarmálsviðgera, sum kennir til málsinnihald – tað gevur tað bestu eftirlit við til dømis navngeving av skjølum og málum o.s.fr.<br>• Til dømis tann gamli journal- og/ella "serbrúkarabólkurin"<br>• Kann verða bæði ein miðsavnandi arbeiðsbólkur og fleiri spjaddir, alt eftir hvat passar myndugleikanum best.<br>• Tjóðskjalasavnið mælir til, at málsviðgerar ikki sjálvir gera eftirmetingina. |
| Hvussu ofta? | • Hvat gevur meining – hvussu ofta skal góðskueftirlit gerast, soleiðis at tað er møguleiki fyri at rætta feilir og broyta óvanar í skrásetingini?<br>• Eina ferð um árið er ikki nóg mikið at rætta feilir – og óvanar kunnu vera torførir at broyta eftir einum heilum ári. |
| Hvussu verður kannað? | • So nógv sum møguligt sjálvirkandi í skipanini, bæði við at seta sokallað "default-virðir" inn í skipanina, sjálvvirkandi mannagongdir (sí niðanfyri) og við maskinkanning (til dømis sendur skipanin ein t-post til |

| | |
|---|---|
| | málsviðgeran við upplýsingum um manglandi málstilknýti, útfylling av avsendara/móttakara v.m.)<br>• Úttøka frá skipanini gevur eina skipaða góðskukanning:<br>Bæði fasta (til dømis skjøl uttan málstilknýti) ella møguleika fyri sjálvur at velja metadátur til mál og skjøl.<br>• Dátur kunnu flytast yvir í eitt rokniark og viðgerast her.<br>• Skoyta upp í við stakroyndum. |
| Hvør rættar feilir? | Tað kann vera málsviðgerin sjálvur, serbrúkarin ella kt-ráðgevin. Málsviðgerin lærir mest um rætta skráseting við sjálvur at eftirkanna og rætta feilir. |
| Uppfylging | Hvat hendir um so er, at har er ein álvarsligur feilur?<br>Tjóðskjalasavnið mælir til, at leiðslan regluliga verður kunnað um hesi viðurskifti. |

## Góð ráð um góðskutrygging

Góðskutrygging er ikki bert góðskueftirlit. Góðskutrygging snýr seg eisini um, at atlit verður tikið til hetta, longu tá ein nýggj skipan verður keypt og til hon skal latast aftur.

### Áðrenn skipanin verður tikin í nýstlu

Tað eru nógv viðurskifti at taka atlit til og kanna, tá hugsað verður um at útvega eina nýggja kt-skipan, men í mun til góðskueftirlit verður viðmælt at kanna:

#### *Sjálvvirkandi arbeiðsgongdir*

Mál og/ella skjøl verða stovnað við ymiskum sjálvvirkandi metadátum, til dømis dagfesting, partur, skrásetanarskipan. Tað kann til dømis vera skjalaskabelónir, har navn, dagfesting, skrásetingarsystematikkur verða stovnað sjálvvirkandi. Tað er eisini ein fyrimunur at síggja skrásetingarsystematikkin – eru har málsbólkar/fasettir, sum hava sama slag av málum, sum við fyrimuni kundu havt sjálvvirkandi mannagongd? Spurningurin er: Hvat kann skipanin – og hvat kann lata seg gera í mun til tykkara málsskipan?

#### *Útskriftir frá skipan*

Nógvar skipanir hava eitt útskriftsmodul, sum vanliga verður brúkt til leiðslufrágreiðingar. Tað er væl egnað til góðskueftirlit. Tað kunnu bæði verða fastar, áðrenn skilgreinaðar útskriftir, til dømis "øll skjøl uttan málstilknýti", ella útvaldar metadátur, dátur kunnu koyrast í eitt rokniark, har tær síðani kunnu flokkast og viðgerast sum einum lystir.

### *Undirvísing í tí nýggju skipanini*

Undirvísast skal ikki bert í teimum ymisku funktiónunum í nýggju skipanini. Stórur fyrimunur er eisini at undirvísa í felags leiðreglum fyri stovnan av málum, (journalisering), skráseta navn og annað tílíkt. Gerið eina undirvísingarmannagongd, har tit bæði ástøðiliga og verkliga viðgera eina málsgongd.

### *Stuðul frá leiðsluni*

Tað er neyðugt, at leiðslan verður tikin við í góðskutryggingina longu frá byrjan. Tað besta er, um so er at tað kann avtalast ein gongd, har tað javnan verður send frágreiðing til leiðsluna, hvussu tað gongur við góðskuni av skrásetingunum. Tað skal verða sjónligt, at leiðslan roknar við, at starvsfólk brúka tíð upp á hesa arbeiðsuppgávu. Lat til dømis tann ábyrgdarhavandi stjóran innleiða undirvísingina.

### *Leiðreglur fyri nýtslu*

Gerið og haldið felags leiðreglur fyri, hvussu tit brúka og skráseta í skipanini – við stuðli frá leiðsluni!

## Tá skipanin er virkin

Tað er, meðan skipanin er virkin, at góðskutryggingin er týdningarmikil. Kannið so hvørt um skrásett er rætt í skipanina, at dátur og skjøl hava góða góðsku. Soleiðis ber til so hvørt at rætta møguligar feilir – OG rætta upp á møguligar óvanar, sum hava sníkt seg inn í skrásetingarnar hjá starvsfólkunum.

Tað er gott við fastari mannagongd fyri góðskutrygging, so at tað ikki skal kroystast inn í ein skundmiklan og strævnan gerandisdag. T.v.s. ein føst mannagongd fyri, hvat tit kanna, hvussu ofta og hvør ger tað.

## Aftaná – tá skipanin verður latin aftur

So er seinasti møguleiki at rudda upp! Hvussu stórt uppruddingararbeiði verður, er treytað av hvussu nógva tíð og orku tit hava brúkt upp á at røkja skipanina,og um góðskueftirlit hava verið gjørd regluliga.

Tit skulu kanna um:

- Eru málini latin aftur?
- Er góðskutrygging framd við afturlating?
- Eru skjøl uttan tilknýti til mál?
- Eru øll skjøl skrásett. Manglar nakað, t.d. frá felagsdrevinum, Outlook v.m. í skipanini? Er skjalfesting? Um so er, at søkt verður um máls-/skjalainnlit um 2 ella 10 ár, eru tit so vís í, at alt viðkomandi tilfar er skjalfest í rætta málinum?
- Kunnu øll skjøl opnast og lesast?
- Fíluformatir – eru øll fílusløg í skipanini loyvd?

Minnist til, at skipanin framhaldandi skal kunna brúkast – pressan og borgarin hugsa ikki um tíðarskifti í skipanini!